# Havstovan søkir eftir **biologassistenti**



## Søkt verður eftir biologassistenti til deildina fyri havsúgdjór á Havstovuni

Viðkomandi skal vera við í dagliga arbeiðinum á deildini fyri havsúgdjór, ið m.a. fevnir um at:

– Gera lívfrøðiligar kanningar av hvali og kópi.
– Skráseta dáta á teldu og greina aldur, nøring og annað á starvsstovu.
– Fara við Jákup Sverra og øðrum skipum/bátum at gera kanningar.
– Annað fyrifallandi arbeiði á stovninum.

Umsøkjarar við áhuga fyri havlívfrøði og kunnleika til hval og kóp hava fyrimun. Góð evni at samstarva er ein fortreyt. Eisini er ynskiligt at viðkomandi er kropsliga væl fyri, praktiskur og er tøkur aðrar tíðir enn vanligar arbeiðstíðir, til dømis tá grind er.

**Nærri upplýsingar** um starvið kunnu fáast við at venda sær til Bjarna Mikkelsen, lívfrøðing, teldupost: bjarnim@hav.fo tlf. 27 85 88.

### Setanartreytir

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

### Umsóknir

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 16. desember 2020.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Havstovan, Nóatún 1, P.O. Box 3051, FO-110 Tórshavn**
**ella teldupost: hav@hav.fo**

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo